# Bárður ger politiskt sjálvmorð

**Bárður Nielsen má vera politiskur analfabetur, um hann heldur seg kunna sleppa væl frá at flyta almenn arbeiðspláss úr Vágum uttan at verða revsaður av veljarunum, sigur Marjus Dam, løgtingsmaður, sum er í øðini um ætlanina at flyta Toll- og Skattstovuna úr Vágum**



*Marjus Dam, løgtingsmaður Sambandsfloksins í Vágum, er í øðini inn á partamannin Bárð Nielsen, sum ætlar at flyta almenn arbeiðspláss úr Vágum til Havnar. Tað fara framtíðar veljararnir í Vágum at revsa hart, sigur hann*

*Mynd: Edvard Joensen*

MIÐSAVNAN
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Marjus Dam, løgtingsmaður, er í luftini um ætlanina at leggja økisskrivstovuna hjá Toll- og Skattstovuni í Vágum niður og flyta størvini til Havnar.

– Bárður Nielsen má vera politiskur analfabetur, um hann heldur seg sleppa væl frá tí. Tað er beinleiðis politiskt sjálvmorð fyri Sambandsflokkin, um hasar ætlaninar gerast veruleiki, sigur Marjus Dam, sum leggur dýran við, at hann fer aldrin at ganga við til hasa ætlanina.

Marjus Dam heldur ikki, at Bárður Nielsen kann hava lært nakað av søguni og vísir til, at Edmund Joensen í síni tíð misti ein fólkatingssess, tí hann varð revsaður í Vágum í samband við málið um undirsjóvartunnilin.

– Verður hendan ætlanin gjøgnumførd, verður tað ikki bara í Vágum, at Sambandsflokkurin verður smurdur av til næsta val. Tað sama verður í Norðoyggjum og kanska á Skálafjørðinum við, sigur Marjus Dam.

Hann heldur ikki, at slíkt hevði hent, um Karsten Hansen sat sum landsstýrismaður við fíggjarmálum. Til tess er hann alt og lokalpatriotiskur, sigur Marjus Dam.

### Uppsagnir

Hóast tað verður sagt nakað annað, so er hetta í roynd og veru at siga fólki upp, sigur Marjus Dam. Hann heldur uppá, at fólk verða tvingað úr sínum størvum, um tey skulu til Havnar at arbeiða.

Hann nevnir sum dømi, at talan er um kvinnur, sum hava smábørn og menn, sum longu frammanundan arbeiða í Havn. Skulu so bæði foreldrini av oynni longu áðrenn klokkan sjey hvønn morgun, verður úrslitið uttan iva, at annað noyðist at gevast.

Ført verður fram, at í staðin fyri økisskrivstovuna skal Tolleftirlitið flytast vestur í Vágar, og at átta tollarar so skulu hava støð í Vágum.

Tí er eingin fongur í, sigur Marjus Dam, tí í hvussu er helvtin má kortini alla tíðina vera í Havn. So har verður einki at vinna.

Tað, sum eftir stendur, er, at almenn arbeiðspláss verða niðurløgd í Vágum, og einki kemur afturfyri. Her er talan um eini fimmseks arbeiðspláss, sum hvørva, og tað merkist, har lítið er til frammanundan, sigur Marjus Dam.

– Tað er politiskur naivitetur at stuðla slíkum bara tí at ein embætismannabólkur kemur við tí, sigur løgtingsmaðurin, sum leggur dent á, at hann aldrin fer at taka undir við hesi ætlanini.

# Málið er hjá Prestafelagnum

**Málið um ósemjuna í Havnar Kirkju liggur hjá danska Prestafelagnum, sum ikki vil gera viðmerkingar til tað**



*Málið um prestarnar í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi er sum ein afturlatin bók hjá Den danske Præsteforening*

PRESTAMÁLIÐ
*Edvard Joensen*

Málið um hjálparprestastarvið í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldið liggur hjá danska prestafelagnum, sum hevur fingið tað frá føroysku deildini í felagnum. Men haðani er eingin viðmerking.

Sosialurin tosaði við Hans Christian Andersen, fyrisitingarleiðara og løgfrøðiligan ráðgeva hjá Den danske Præsteforening, men hann noktaði blankt at gera nakra sum helst viðmerking til málið. Hann vildi hvørki vátta ella avsanna, um Prestafelagið yvirhøvur hevði fingið málið.

Men sum skilst á formanninum í føroysku deildini í Prestafelagnum, hevur Prestafelagið fyri nakað síðan fingið málið.

Málið kom fyrst til føroysku deildina, sum lat tað víðari til høvuðsskrivstovuna, tí har er jurdiski førleikin, sum krevst í slíkum føri, sigur Jákup Reinert Hansen, formaður í føroysku deildini.

Málið er ikki nýtt, sigur hann. Prestafelgið hevur eina tíð fylgt málinum tætt. Men har vóru ymiskir faktorar í málinum, sum gjørdu, at tað rættiliga skjótt varð latið høvuðsskrivstovuni, sigur Jákup Reinert Hansen.

Den danske Præsteforening er stórt felag við 27 deildum. Ein er í Føroyum. Hvør deildin velur so ein formann, sum líkasum er álitismaður hjá limunum í deildini, greiðir Jákup Reinert Hansen frá.